ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1 – 3
100 Tórshavn

19. desember 2023
Mál: 23/25094
Tygara skriv:
Viðgjørt:

Nr. 52-061/2023

Svar upp á skrivligan fyrispurning nr. 52-61/2023 eftir tingskipanini §52a til Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum, frá Liljan Weihe, løgtingskvinnu, um fíggjarstøðuna hjá lág og miðalløntum

Spurningar:

1. Hvussu sær fíggjarstøðan út hjá einum støkum arbeiðara í Tórshavn við trimum børnum, sum hevur eina mánaðarløn uppá 20.000 kr.?
2. Hvussu sær fíggjarstøðan út hjá einum støkum lærara í Tórshavn við trimum børnum, sum hevur eina mánaðarløn á 38.524 kr.?
3. Hvussu sær fíggjarstøðan út hjá einum støkum løgtingsfólki í Tórshavn við trimum børnum, sum hevur eina mánaðarløn á 42.875 kr.?
4. Hvørjar almannaveitingar, hjálparpakkar v.m. hava hesir bólkar rætt til? Og hvørjar eru upphæddirnar?

Svar:
Fíggjarliga støðan hjá húskjum er sum kunnugt treytað av inntøkum og útreiðslum, sum familjan hevur. Útreiðslur eru sjálvsagt ymiskar frá húski til húski, og tí fevnir hetta svarið einans um inntøkur, skattaútreiðslur og stuðulsskipanir til stakar uppihaldarar.

Tað verður ikki spurt um eitt ávíst árstal. Vit eru enn í 2023, men standa á gáttini til 2024, og tí verður svarað fyri bæði árini. Lønarinntøkan er tó tann sama bæði árini, og sostatt er ongin lønarhækkan frá 2023 til 2024 í dømunum niðanfyri.

Fortreytir í dømunum
- Barnafrádráttarupphæddin er treytað av aldri á barninum. Í dømunum niðanfyri eru børnini 2, 5 og 8 ár.
- Arbeiðsmarknaðargjøld fevna um ALS-gjald, barsilsgjald, gjald til samhaldsfasta, Heilsutrygdargjald og kringvarpsgjald
- Kirkjuskattaprosentið er 0,6
- Tað er ymiskt, hvussu fakfeløgini skipað seg viðvíkjandi tryggingum o.l. , og tí er avgerð tikin um ikki at hava limagjald til fakfeløg við í dømunum.
- Í 2024 er skatturin roknaður sambært broyttu skattalógini (lm. nr. 37/2023).

Dømini niðanfyri eru frá nøkrum givnum fortreytum. Broytast fortreytirnar, so broytast upphæddirnar sjálvsagt eisini. T.d. um yngsta barnið er 5 ár, tá verður dagstovnagjaldið lægri,

og hægru inntøkurnar hava sostatt hægri tøka inntøku. Um arbeiðarin í døminum t.d. hevur eina uppsparing, so lýkur viðkomandi ikki treytirnar til familjuískoyti ella hjálparískoyti, og tøka inntøkan er tá munandi lægri.

2023	***Arbeiðari***	***Lærari***	***Løgtingsf.***
Lønarinntøka um árið	240.000	462.288	514.500
Inntøkuskattur	69.928	166.929	190.820
Arbeiðsmarknaðargjøld	17.244	29.598	32.506
Barnafrádráttur	48.900	48.900	48.900
Inntøka aftaná skatt	*201.728*	*314.661*	*340.074*
Barnaískoyti til stakar uppihaldarar	30.984	30.984	30.984
Barnagjald	40.284	40.284	40.284
Familjuískoyti	30.000	-	-
Hækkað familjuískoyti	15.750	-	-
Hjálparískoyti/orkuískoyti	12.000	-	-
Inntøka tilsamans	*330.746*	*385.929*	*411.342*
Gjald fyri dagstovn	-	38.698	38.698
Inntøka um árið aftaná skatt og gjøld	330.746	347.231	372.644
Inntøka um mánaðin aftaná skatt og gjøld	**27.562**	**28.936**	**31.054**

2024			
	Arbeiðari	***Lærari***	***Løgtingsf.***
Lønarinntøka um árið	240.000	462.288	514.500
Inntøkuskattur	68.528	163.029	186.920
Arbeiðsmarknaðargjøld	16.764	28.674	31.477
Barnafrádráttur	48.900	48.900	48.900
Inntøka aftaná skatt	*203.608*	*319.485*	*345.003*
Barnaískoyti til stakar uppihaldarar	32.160	32.160	32.160
Barnagjald	41.832	41.832	41.832
Familjuískoyti	30.000	-	-
Hækkað familjuískoyti	-	-	-
Hjálparískoyti/orkuískoyti	10.000	-	-
Inntøka tilsamans	*317.600*	*393.477*	*418.995*
Gjald fyri dagstovn	-	40.062	40.062
Inntøka um árið aftaná skatt og gjøld	317.600	353.415	378.933
Inntøka um mánaðin aftaná skatt og gjøld	**26.467**	**29.451**	**31.578**

Almannaveitingar og stuðul til stakar uppihaldarar

Barnafrádráttur í skattinum: Fyri hvørt barnið, ið er skrásett at búgva á bústaðnum, verður veittur ein frádráttur í ávikavist lands- og kommunuskattinum. Fyri ein persón, sum býr í Tórshavnar kommunu, er samlaði barnafrádrátturin 14.500 kr. fyri hvørt barni um árið.

Serligt barnaískoyti til stakar uppihaldarar: Persónur, sum er uppihaldari av barni og ikki livir í parlagi, hevur rætt til serligt barnaískoyti. Upphæddin í 2023 er 10.328 kr. fyri hvørt barni um árið, og í 2024 er upphæddin 10.720 kr. fyri hvørt barni.

Familjuískoyti: Stakur uppihaldari, sum ikki hevur innistandandi pening av týdningi ella ikki eigur virðisbrøv, og sum hevur inntøkugrundarlag lægri enn 290.000 kr., hevur rætt til familjuískoyti. Tey við inntøkugrundarlag upp til 120.000 kr. fáa hægstu upphædd, sum er 48.000 kr. um árið umframt 6.000 kr. fyri hvørt barni, sum kemur aftrat tí fyrsta barninum. Upphæddin lækkar stigvíst, so hvørt inntøkugrundarlagið hækkar.

Í tíðarskeiðinum juni til des. 2023 er familjuískoyti hækkað við 750 kr. fyri hvørt barni um mánaðin.

Barnagjald: Barnagjald er eitt gjald frá einum foreldri til hitt, og talan er sostatt ikki um ein stuðul frá tí almenna. Vanliga verður barnagjaldið útgoldið av Almannaverkinum, meðan TAKS krevur gjaldið inn frá gjaldskylduga. Barnagjaldið í 2023 er 13.428 kr. fyri hvørt barni um árið. Upphæddin í 2024 er 13.944 kr. fyri hvørt barni. Í teimum førum, at gjaldsskyldugi hevur høga inntøku, kann eitt hægri barnagjald verða álagt.

Hjálparískoyti: Freistin at søkja um hjálparískoyti var 30. juni 2023. Hjálparískoyti er ein 12.000 kr. og er bara útgoldin einaferð. Stakur uppihaldari við inntøkugrundarlag upp til 290.00 kr., sum ikki hevur innistandandi pening av týdningi og ikki eigur virðisbrøv, kann fáa hjálparískoyti.

Orkuískoyti: Treytirnar at fáa orkuískoyti eru tær somu sum hjálparískoyti, tó at inntøkugrundarlagið er í mesta lagi 300.000 kr. Orkuískoyti, ið verður útgoldin sum ein eingangsupphædd, verður útgoldið fyrstu ferð í 2024 og síðstu ferð í 2026. Upphæddin í 2025 er 10.000 kr. og í 2025 og 2026 er orkuískoyti 5.000 kr.

Fíggjarligt fripláss á dagstovni: Familjur við lágum inntøkum kunnu søkja kommununa um at sleppa undan dagstovnagjaldi. Inntøkugrundarlag í sambandi við fíggjarligt fripláss verður árliga ásett í rundskrivi, galdandi frá 1. aug. til 31. juli árið eftir. Sbrt. núgaldandi rundskrivi rindar stakur uppihaldari við ársinntøku undir 304.500 kr. onki dagstovnagjaldið. Gjaldið hækkar stigvíst, so hvørt inntøkan hækkar. Tá inntøkan er hægri enn 380.500 kr. verður rindað fult dagstovnagjald.

Tórshavn, 19. desember 2023

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna